


## Prísurin hækkar 17. juli

Um ein mánað verður Summar Festivalurin hildin í Klaksvík. Í døgunum frá 7. til 9. august verður stóra tónleikabrakið, og nógv spennandi er á skránni á fyra pallum í triggjar dagar.

Forsølan til Summar Festivalin hevur gingið sera væl, og longu nú er greitt, at tað verður sera nógv fólk til festivalin í ár.

Prísurin á vikuskiftispassum hækkar mikudagin 17. juli, og tá fer kostnaðurin úr 895 krónum og upp í 995 krónur. So skalt tú spara 100 krónur, so er at keypa vikuskiftispass í seinasta lagi mikudagin.

Atgongumerki til Summar Festivalin fáast á Shell-støðum kring landið, í Telebúðum og á teleshop.fo

## Bátar, húsvognar og tjald

Umframt gistingarhúsini, summarhús og gisting hjá familju ella kenningum, ber eisini til at koma á Summar Festivalin við báti, húsvogni og tjaldi

Gistingarhúsini og summarhúsini í Norðoyggjum plaga øll at verða bileygd á Summar Festivalinum, og tey, sum ikki hava familju ella kenningar at búgva hjá, hava eisini aðrar møguleikar.
Nógv velja at fara á festivalin við báti ella húsvogni, og summi taka tjaldið við sær.

### HÚSVOGNAR

Tað er vorðið alsamt meira vanligt at fólk ferðast uttanlands og í egnum landi við einum húsvogni afturúr bilinum. Klaksvík tekur væl ímóti festivalgestum, sum hava valt hugnaligu loysnina at gista undir egnum taki meðan Summarfestivalurin er.
Húsvognar fáa umvegis Kunningarstovuna í Klaksvík ávíst økið í miðbýnum í Klaksvík, sum eisini syrgir fyri at vognarnir verða íbundnir, fáa streym og atgongd til vatn og wc.



Andras Joensen, bóndi, hevur nógv góð tjaldingarpláss at vísa á í vakra bønum í Gerðunum
Mynd: Erik Biskopstø



### TJALDING

Tjaldingin á Summarfestivalinum verður skipað saman við Kunningarstovuni og bóndunum, sum eiga og vara av vakra bønum í Gerðunum í Klaksvík. Øll, sum ynskja tjaldingarpláss á Summarfestivalinum, kunnu venda sær til Kunningarstovuna, sum í neyvum samstarvi við Andras Joensen, bónda, fáa ávíst hóskandi og egnað økið. Tjaldingin verður í stóran mun skipað eftir aldri og áhugamálum, soleiðis at tey ungu og familjur við børnum ikki nýtast at liggja uppat hvørjum øðrum. Allir tjaldarar, sum virða galdandi reglu fyri tann einstaka og sjálvt tjaldingarøkið, eru hjartaliga vælkomnir á Summarfestivalin!

Meira um tjaldingina á summarfestivalur.fo og kunning.fo

### BÁTAR

Onki er sum í egnum báti at stevna inn í vágna og vita sær at nakrir góðir dagar eru fyri stavn.
Skipað verður soleiðis fyri at heilt nógvir bátar kunnu liggja við bryggja í Klaksvík meðan festivalurin er. Treytin fyri góðum bátaplássi er, at boðað verður frá í góðari tíð til Kunningarstovuna, og at í minsta lagi tvey av manningini hava atgongumerki til festivalin. Klaksvík er frá náttúrunar hond ein trygg og góð havn og um veðrið verður til vildar, so kann Summarfestivalurin 08 eisini gerast ein stórur og væleydnað bátastevna við livandi tónleiki á dekkunum og bryggjudansi.



Sosialurin